# Gera kanska skúla í Suðuroy til næmingar við trupulleikum

**Landsstýrið umhugsar nú møguleikanum um at gera ein skúla í Fámará í Suðuroy til skúlanæmingar sum ikki megna at laga seg eftir vanliga fólkaskúlanum**

SKÚLATILBOÐ

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Her, á fjarskotna bóndagarðinum í Fámará á vestursíðuni á Suðuroy, eru tankar frammi um at gera ein serligan skúla til næmingar, sum ikki megna at laga seg eftir vanliga fólkaskúlanum. Í Fámará skulu næmingarnir fáast við alt, sum hoyrir einum vanligum bóndagarði til, men teir skulu eisini kunna fáa eina ávísa skúlagongd*

Nú verður gamli bóndagarðurin í Fámará í Suðuroy kanska skúli fyri næmingar, sum hava trupult við at laga seg eftir vanliga fólkaskúlanum.

Landsstýrismaðurin í skúlamálum, Jógvan á Lakjuni, hevur fingið eitt álit frá einum arbeiðsbólki um, hvussu hesin fjarskotni bóndagarðurin í Fámará á vestursíðuni í Suðuroy kann gerast til ein skúla fyri næmingar, sum ikki fáa verið í vanliga fólkaskúlanum av ymsum orsøkum, eitt nú av sosialum orsøkum.

Hetta var ein arbeiðsbólkur, sum Annlis Bjarkhamar setti, tá ið hon var landsstýriskvinna í mentamálum til at kanna málið um, hvussu Fámará kann gerast til ein slíkan skúla.

Her verður serliga hugsað um næmingar í framhaldsdeildini, tvs, næmingar ímillum 14 og 17 ár.

Í arbeiðsbólkinum sótu Nick Thomsen, sum boðaði fólkaskúlan, Emmy Joensen, sum umboðaði mentamálaráðið og Súsanna Nolsøe, sum umboðaði Almanna- og heilsumálaráðið.

Av tí at jarðarráðið eigur festið í Fámará, var eisini Gunnar Bjarnason á Jarðarráðnum við í arbeiðsbólkinum.

### Sjey næmingar sendir av landinum

Jógvan á Lakjuni sigur at tað eru fleiri næmingar, sum hava trupult við at laga seg eftir vanliga fólkaskúlanum og tí er tað heilt avgjørt tørvur á einum serligum tilboði til teir.

– Í løtuni eru vit í teirri støðu, at vit hava einki at bjóða hesum næmingum og vit hava sostatt sent sjey næmingar á serligar stovnar í Danmark tí teir hava ymsar trupulleikar sum gera, at teir fáa ikki verið í vanliga fólkaskúlanum.

Landsstýrismaðurin heldur, at hetta er ikki nøktandi. Tí eiga vit at gera eitt tilboð til hesar næmingar og í tí sambandi er hugskotið komið um at gera eitt skúlatilboð til slíkar teir í Fámará.

Fyribils er lagt upp til at pláss skal vera til einar 16 næmingar í Fámará.

– Ætlanin er at talan skal vera um eitt skúlatilboð, sum bæði byggir á tað verkliga og tað bókliga.

Tað merkir, at næmingarnir skulu fáast við alt vanligt arbeiði á einum bóndagarði við seyði, velting og øllum øðrum, men so skuldu teir eisini hava eina ávísa skúlagongd.

Harafturat er tað ikki so langt til Vágs, har næm ingarnir so kunnu fáa onnur, verklig tilboð, eitt nú umborð á sluppini Johonnu, í sambandi við ítrótt og annað.

Ætlanin er at talan skal vera um ein kostskúla og tað merkir, at næmingarnir skulu búgva á skúlanum.

### Fámará væl hóskandi

Sjálvur heldur Jógvan á Lakjuni, at Fámará er sera væl hóskandi til endamálið, tí plassið er passaliga fjarskotið, men kortini er tað ikki so langt frá Vági, har flestu hentleikar eru.

– Tað eru ikki nógv pláss í Føroyum, sum liggja so væl fyri til eitt slíkt endamál, heldur hann.

Jógvan á Lakjuni veit ikki enn um ætlanin verður til veruleika, men nú skal tað viðgerast meir. Enn er ætlanin avgjørt bert á hugskots-støði og týsdagin kunnaði hann landsstýrið um álitið hjá arbeiðsbólkinum. Men hann viðgongur, at honum dámar væl hugskotið.

Kortini ásannar hann, at hetta er eitt dýrt skúlatilboð. Hann væntar, at tað verður neyðugt at brúka einar 10 milliónir til at byggja hús um og byggja út í Fámará.

Somuleiðis er neyðugt at gera stórar ábøtur á vegin til Fámará, sum er vánaligur.

Harafturat verður neyðugt við einum 10-11 starvsfólkum av ymsum slagi í seinum slíkum skúla so raksturin er eisini dýrur.

Hann sigur, at verður hetta sett í verk, kemur landið helst at betala bróðurpartin av útreiðslunum, men hann heldur eisini, at kommurnar, haðani næmingarnir á skúlanum eru, eiga at betala eina ávísa upphædd fyri hvønn næming.

Jógvan á Lakjuni sigur, at hann er eisini í ferð við at kanna aðrar møguleikar fyri at skapa eitt tilboð til slíkar næmingar, eitt nú í sambandi við arbeiðsmarknaðin, har næmingarnir kunnu vera á einum arbeiðsplássi ein ávísan part av degnum.

# Hovbingar sinnaður at hava fólkaatkvøðu seinni

**Hovbingar høvdu ikki at stundir at skipa fyri fólkaatkvøðu um kommunusamaleggin g í dag, men teir eru sinnaðir at arbeiða víðari við málinum**

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hovbingar eru sinnaðir at arbeiða víðari við tankanum um at halda fólkaatkvøðu um at leggja kommunur í oynni saman.

Tað samtykti Hovs Bygdaráð á fundi leygardagin.

Tvøroyrar Býráð hevur annars heitt á kommunurnar um at skipa fyri fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging í dag, samstundis sum fólkatingsval er.

Tá ið kommunuvalið var í november, høvdu Tvøroyrar og Sumbiar kommuna eisini fólkatkvøðu um at leggja alla oynna saman í eina komunu og í báðum plássum var stórur meiriluti fyri tí.

Og Tvøroyrar Býráð heldur, at vit eiga at fáa at vita, hvat suðuroyingar halda um kommunusamanlegging og tí varð heitt á hinar fimm kommunurnar um at brúka fólkatingsvalið sum eitt høvi til at skipa fyri fólkaatkvøðu um kommunusamanlegging.

Men ongin kommuna fer at taka áheitanina til eftirtektar.

Leygardagin viðgjørdi Hovs Bygdaráð áheitanina, men har var niðurstøðan, at skotbráið var alt ov stutt og tí verður ongin fólkaatkvøða á hesum sinni.

Í farnu viku vóru brævatkvøðurnar longu við at koma inn. Somuleiðis vóru sjómenn burtur eins og aðrir veljarar eisini vóru burtur. Sostatt høvdu tað verið nógvir veljarar, sum ikki høvdu havt møguleika at velja.

Men Hovs Bygdaráð vísti als ikki tankanum um eina fólkaatkvøðu við sær. Sostatt staðfesti bygdaráðið eisini at tað er sinnað at arbeiða víðari við málinum og at hava eina fólkaatkvøðu seinni, tá ið málið er betri fyrireikað.

Men Hov Bygdaráð hevur eisini fyri langari tíð samtykt, at skal talan vera um at leggja saman, skal øll Suðuroyggin verða ein kommuna, tí at leggja saman í tvær kommunur førir ongabroyting við sær, tí so slepst ikki undan tvídráttinum ímillum syðru- og norðaru helvt.

Aðrar kommunur halda eisini, at skotbráið varð so stutt. Men summar kommunur halda eisini, at tað er neyðugt at fyrireika málið betri. Áðrenn eina fólkaatkvøðu vilja vilja tær tí hava eina fakliga lýsing av fyrimunum og vansum við samanlegging fyri at geva borgarunum eitt betri støði at taka støðu útfrá.

KOYRISKÚLIN V/ÁRNA ANDREASEN

Nýtt skeið byrjar
mánadagin 14. februar 2005

Ringið tel 22 24 70 / 31 87 79

KOYRISKÚLIN V/ÁRNA ANDREASEN · TÓRSHAVN